


# Dollarin styrknaður munandi

MARKNAÐARRÁK

Eftir at dollarin javnt og samt er viknaður seinastu vikurnar, kom vend í, í farnu viku. Orsøkirnar eru tvær. Hóast evropiski miðbankin á fundi teirra tann 8. januar segði seg ikki harmast sterku evruna; ella veika dollaran, hava fólk úr ECB eftir fundin ført fram, tað óhepna við einari sterkari evru.

Onnur orsøk til evru-dollara støðuna hevur verið tað alsamt økta hallið á amerikanska handilsjavnaðnum. Í farnu viku vísti ein uppgerð tó, at hallið í novembur fall úr 41,6 milliardum dollarum í 38,0 milliardir dollarar. Hetta er ikki bert ein gongd rættan vegin, men væntað varð ikki, at hallið fór at lækka so nógv. Saman við røddunum úr Evropa, fekk batnaði handilsjavnin dollaran at styrkna. Lægsta stigið í dollaranum á hesum sinni var tann 12. januar, tá ein dollari kostaði 577,43 krónur. Í skrivandi løtu kostar dollarin 602,92 krónur. Hetta er ein hækking á 4,4%

Umframt at bjørt tøl úr USA, m.a. fyri brúkaraálitið, eisini fingu ávirkan á dollaran, gjørdu hesi sítt til, at renturnar fríggjadagin fóru at hækka; eisini um okkara leiðir. Um renturnar halda fram at hækka hesa vikuna er tengt at, um dollarin styrknar meira og sjálvandi rokskapunum, ið verða kunngjørdir hesa vikuna. Hesa vikuna kunngerða m.a. virkini AMD, General Motors, Motorola, Microsoft, Ford, Nokia og Siemens rokskap.

Virkini sum kunngjørdu í farnu viku, vístu sum heild á inntøkur, hægri enn væntað. Tó vóru inntøkurnar hjá IBM eitt lítið vet lægri enn væntað. Somuleiðis skal nevnast, at Intel metti, at inntøkurnar fara at fella í fyrsta ársfjórðing í ár. Hóast Intel fall eftir kunngerðina, so sýnast partabrøv at standa stinn í løtuni, og amerikonsk partabrøv eru sum heild hækkaði 8 vikur á rað. Mett verður tískil, at lánsbrævarenturnar og partabrøvini sannlíkt eisini fara at hækka hesa vikuna. Lánsbrævarenturnar eru falnar nógv síðani árskiftið, og ein mótrørðsla er tí væntandi nú dollarin er styrknaður og búskaparligu uppgerðirnar sum heild hava verið bjartar. Hesa vikuna verður tó tunnligt við búskaparligum uppgerðum, og tí vilja rokskaparkunngerðirnar hava størstu ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar. Nokia hevur longu lagt støðið, og kunnað um teirra metingar. Av tí at hetta er so stutt síðani, fara metingar teirra at verða staðfestar í rokskapinum.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,62% | 0,06% |
| 5 ára lánsbræv | 3,49% | 0,08% |
| 10 ára lánsbræv | 4,35% | 0,06% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 265,2 | 3,0% |
| OMX, Svøríki | 677,6 | 3,9% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.749,4 | 2,2% |
| S&P 500, USA | 1.139,8 | 1,1% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 107,92 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 165,01 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 76,75 | 2,1% |
| Altjóða Partabrøv | 72,65 | 0,4% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 602,92 | 3,2% |
| EUR | 744,81 | 0,0% |
| GBP | 1.077,76 | -0,1% |
| NOK | 86,44 | -0,1% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*





